Vikuskiftis Sosialurin



## Hjálp frá Atlantsflogi

Vánalig floglíkindi hava darvað flígvingini hjá grønlendska Air Greenland teir seinastu dagarnar, og tí bað felagið Atlantsflog um hjálp til at flyta fólk og farm, sum vóru seinkað av veðrinum. Grønlendska kringvarpið KNR sigur, at eitt flogfar hjá Atlantsflogi skuldi hjálpa Air Greenland í gjár og í dag. Í gjár skuldi tað føroyska flogfarið flúgva millum Kangerlussuaq ogNarsarsuaq, og í dag skuldi tað so flúgva millum Kangerlussuaq og Pituffik. Samstundis hevur Air Greenland skipað fyri tyrlusambandi til Pituffik, sigur KNR.



## Bjálving á fíggjarlógina

Jess Svane, sum er borgarstjóri í grønlendsku kommununi Qaasuitsup vil hava landspolitikararnar at játta pengar til húsabjálving. Hann sigur, at grønlendska útlátið av $CO_2$ kann skerjast munandi, um hús og íbúðir verða bjálvað betur, og at øll nýggj hús verða munandi betur bjálvað enn tey verandi. Men fíggjarliga er hetta ein so stór uppgáva, at kommunurnar megna ikki at lyfta hana, sigur Jess Svane. Borgarstjórin í Qaasuitsup fýlist á, at Landstingið hevur ikki sett pengar á fíggjarlógina til bjálving.

# Jacob Vestergaard lítlan hug til samráðingar

**Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, sigur seg hava lítlan hug at fara til Ruslands at samráðast, so leingi málið um Skálaberg ikki hevur fingið eina virðiliga loysn**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Jacob Vestergaard heldur, at málið um Skálaberg, sum russar nú hava afturhildið í Murmansk í ein heilan mánaða, hevur gjørt viðurskiftini millum londini so trupul, at trupult er at fara til nýggjar samráðingar, soleiðis sum støðan er*

Russar hava nú bjóðað føroyingum til nýggjar samráðingar um fiskiveiðisáttmálan millum londini fyri 2010.

Herfyri var ein stór russisk samráðingarnevnd í Føroyum, men eftir at partarnir høvdu samráðst í tríggjar dagar, spurdist einki burtur úr samráðingunum.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, segði tá, at tøkan av Skálabergi hevði hevði lagt so stórar skuggar yvir viðurskiftini millum londini, at hetta var størsta forðingin fyri nýggjum sáttmála.

Málið um Skálaberg var fyri á stuttum rættarfundi í Murmansk í gjár og skuldi ætlandi takast uppaftur í morgun.

Tó at hetta mál enn er ikki loyst, hava russar umvegis sendistovuna í Danmark biðið um nýggjar samráðingar við føroyingar um fiskiveiðisáttmálan. Teir hava skotið upp, at samráðingarnar verða í Moskva 29. desember.

### Virðilig loysn

Jacob Vestergaard sigur, at Fiskimálaráðið í brævi hevur latið russar vitað, at samráðingarnar um nýggjan sáttmála millum londini í ein ávísan mun eru treytaðar av einum ávísum máli, sum hann tekur til.

- Vit kenna okkum nokso ótryggar við viðurskiftini landanna millum, soleiðis sum russar hava handfarið málið um Skálaberg, sigur landsstýrismaðurin.

Jacob Vestergaard sigur seg hava lítlan hug at fara til Ruslands at samráðast, so leingi hetta mál ikki hevur fingið eina virðiliga loysn.

Soleiðis er eisini ógreitt í løtuni, nær nýggjar fiskiveiðisamráðingar verða millum Føroyar og Ruslands.

# Avtalan kemur í hús

**Vilhjálmur Nielsen, orku- og veðurlagsráðgevi, er sannførdur um, at ein nýggj veðurlagsavtala kemur í hús í Keypmannahavn. Hann heldur eisini, at føroyska uppskotið kundi verið meira optimistiskt**

COP15
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Avtalan kemur í hús á COP15. Tað er Vilhjálmur Nielsen, orku- og veðurlagsráðgevi, sannførdur um. Hann heldur tó, at føroyska uppskotið gott kundi verið betri.*

*Mynd: POLFOTO*

Føroyska uppskotið til minking av $CO_2$ útláti upp á 20 prosent innan 2020, kundi verið munandi meira optimistiskt. Tað heldur Vilhjálmur Nielsen, sum er orku- og veðurlagsráðgevi, og hevur kjarnuførleikar innan millum annað orkupolitikk, Kyoto, útlát, umhvørvisárin og orkukostnað.

Hann sigur, at tað er ikki tøkniliga ómøguligt at minka um útlátini við meira enn 20 prosentum, men at tað meira er politiskt ómøguligt.

- Um føroyska uppskotið er eitt gott uppskot, tað veldst um, um tú fert í smálutirnar ella ikki. Tað avgerandi har er, hvat tú ger aftaná. Hetta er fyrstu ferð, at eitt samt Løgting sigur, at Føroyar skulu binda seg langsiktað upp á at minka um $CO_2$ útlátið. Og har stendur eisini, at man skal fylgja tí annaðhvørt ár, at gera tær broytingar, sum skulu til. Ein partur av tí, sum er, er at har stendur ógvuliga lítið um fiskivinnuna. Men har kemur tað at henda kortini, og við tí tøknimenninginí, sum man kann gera har, og sum kortini fer at vera. Um vit høvdu lagt okkum fast, og sagt, at hetta vilja vit gera, so høvdu vit staðið ógvuliga sterkt, tí tað ger eingin annar, staðfestir Vilhjálmur Nielsen.

### Avtalan kemur í hús.

Hann hevur í vikuni verið á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn, har hann hevur umboðað BlueGreenFuture, og hann hevur, sum vera man fylgt væl við gongdini.

Hann er eisini sannførdur um, at ein avtala kemur í hús í Keypmannahavn.

- Har verður so ein avtala gjørd. Og tað verður sagt, at hon verður góð. Tað ber ikki til, at hava so nógv fólk á hasum stignum samlað saman, uttan at okkurt skal eitast at verða komið burturúr. Og tað avgerandi er, at tá tey so siga, at hetta er ein góð avtala, so noyðast tey eisini at syrgja fyri, at tað framyvir kemur at vísa seg sum, at tað er ein góð avtala, sigur Vilhjálmur Nielsen.